24.04.2023 P/F,
Garðabrekka 4,
510 Gøta

Argir hin 26. juli 2024
Málsnr.: 24/17694
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Rúna Hjelm

## Góðkenning av ætlan hjá 24.04.2023 P/F um útbygging av havnarlagi Undir Gøtueiði

Góðkenningin hevur heimild í § 21, stk. 1 og 2 í løgtingslóg nr. 59 frá 2005 um verju av havumhvørvinum við seinni broytingum.

### 1. Heimild

Sambært § 21, stk. 1 í lógini um verju av havumhvørvinum skulu verkætlanir á sjónum og fram við strondini, sum hava týðandi ávirkan á náttúru og umhvørvi, ikki setast í verk uttan góðkenning frá landsstýrismanninum. Góðkenningar sambært § 21, stk. 1 kunnu sambært stk. 2 ikki veitast, fyrr enn mett er um avleiðingarnar fyri náttúru og umhvørvi. Sambært stk. 3 kann landsstýrismaðurin taka avgerð um innihaldið í metingunum sambært stk. 2, og sambært stk. 4 kann landsstýrismaðurin taka avgerð um, hvørjar verkætlanir og virksemi skulu góðkennast sambært stk. 1. Hesar heimildir eru við skrivi frá Innlendismálaráðnum hin 12. oktober 2011 lagdar til Umhvørvisstovuna.

Málið byrjaði í 2019 við fleiri áhugapørtum. Í byrjanini var ætlanin at byggja út eitt 2.500 m langt øki Undir Gøtueiði, men við tíðini er verkætlanin vorðin ítøkilig við staðsetingini við Tjørnunes. Partarnir, sum í dag standa fyri verkætlanini, eru 24.04.2023 P/F, sum er dótturfelag hjá P/F Varðanum, og Eysturkommuna, ið hin 6. juni 2024 søktu Umhvørvisstovuna um loyvi til at gera havnaútbygging Undir Gøtueiði sambært lóg um umhvørvisvernd og lóg um verju av havumhvørvinum. Viðfest umsóknini var dagførd umhvørvisárinsmeting fyri ætlaðu havnarútbyggingina.

Í umhvørvisárinsmetingini verður ávirkanin frá ætlaðu bygging av nýggjum havnarlagi Undir Gøtueiði lýst, eitt nú við serligum atliti at rekreativa økinum kring Kvørnina, ið liggur skamt frá Tjørnunesi í ein sunnan.

### 2. Umsókn og málsviðgerð

Fyrsta uppskotið um umhvørvisárinsmetingina fyri økið Undir Gøtueiði varð sent Umhvørvisstovuni 1. mai 2023. Síðani eru fleiri kanningar gjørdar, eitt nú av botnviðurskiftum við havnarlagið Undir Gøtueiði, og um møguliga ávirkan av øktari skipaferðslu á rekreativa økinum kring Kvørnina. Umhvørvisstovan fekk dagførdu umhvørvisárinsmetingina við fylgiskjølum 6. juni 2024, og 7. juni 2024 varð umhvørvisárinsmetingin løgd til almenna hoyring á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni. Tá freistin at koma við viðmerkingum var úti 19. juli 2024, hevði Umhvørvisstovan ongar viðmerkingar fingið.

Uppskot til góðkenning varð hin 25. juli 2024 sent 24.04.2023 P/F og Eysturkommunu til hoyringar.

24.04.2023 P/F og Eysturkommuna høvdu ongar viðmerkingar til uppskotið.

## 3. Lýsing av virkseminum og umhvørvisviðurskiftum

Ætlanin hjá 24.04.2023 P/F og Eysturkommunu snýr seg um at byggja tilsamans 30.000 $m^2$ stóra atløgubryggju norðanfyri bygdina Undir Gøtueiði. Bygt verður soleiðis, at býtið millum matrikul 334b og 334c í Syðrugøtu er 15.000 $m^2$ av havnarøki á hvørjum matrikli (sí mynd 1.).



**Mynd 1.** Staðseting av nýggjum havnarøki, norðanfyri bygdina Undir Gøtueiði

Í umhvørvisárinsmetingini er verkætlanin og virksemið lýst, og mett er um ta ávirkan á náttúru og umhvørvi, sum kann væntast av ætlanini, bæði í sambandi við bygging og rakstur.

24.04.2023 P/F og Eysturkommuna hava serstakar góðkenningar knýttar at hvør sínum matr. nr. Hendan góðkenningin hjá 24.04.2023 P/F er knýtt at matr. nr. 334b.

### 3.1 Lýsing av virkseminum

Ætlanin hjá 24.04.2023 P/F er at gera spunskai til vinnuvirksemi og frystitunlar. Eysturkommuna skal gera spunskai (sí mynd 2). Dýpið á kaiini verður frá 12-15 m, og mett verður, at umleið 230.000 $m^3$ av gróti fer til at byggja kaiina. Væntandi verða upp til 30% av samlaðu víddini á havnarlagnum brúkt til bygningar.

Ætlanin er, at økið skal brúkast til vanligt havnarvirksemi so sum av- og áskipan av fiskavørum, vinnu- og brúksvørum, fiskivinnuvirksemi og vanligt vinnuvirksemi.

Økið er í byggisamtyktini hjá Eysturkommunu útlagt sum havnarøki, t.e. øki D.




**Mynd 2.** Prinsipptvørskurður av bryggjuni Undir Gøtueiði

Í árinsmetingini verður upplýst, at P/F Varðin, sum felagið 24.04.2023 P/F samstarvar við, manglar atløgupláss til skipini og pláss til atknýtt virksemi. Sum er, verður trol og onnur útgerð løgd á goymslu í gomlum grótbrotum og aðrastaðni, har pláss er fyri tí. Eisini manglar Varðin frysti- og goymslupláss. Frystigoymslan hjá Varðanum Pelagic á Tvøroyri er ov lítil, og tí verður stórur partur av frysta fiskinum fluttur til goymslur í Evropa, áðrenn hann verður seldur.

Orsakað av krøvum frá keyparum verður stórur partur av frysta fiskinum fluttur aftur til Føroya, áðrenn hann verður seldur víðari. Tá verkætlanin er liðug, sleppur Varðin stórt sæð undan at flyta fiskin til goymslur í Evropa.

Eysturkommuna manglar økir til vinnustykkir og hevur tørv á atløgusíðu og kaiplássi til vinnuna í kommununi. Verandi kaiøki í Norðragøtu kann ikki víðkast, uttan at størri íløgur verða gjørdar í nýggjan pir.

## 3.2 Búlendiskanning og alduávirkan frá skipum

Biofar hevur í Búlendiskanning, dagfest 10. januar 2024, kannað økið við Tjørnunes, har nýggja havnarlagið Undir Gøtueiði eftir ætlan verður staðsett. Samanumtikið vísir kanningin, at tað ikki eru búlendir, sum verða mett sjáldsom fyri Føroyar ella nærumhvørvið, í økinum, har havnarlagið verður lagt. Tó verður víst á, at økið kring Kvørnina, beint sunnanvert Tjørnunes, verður mett at vera vert at varðveita vegna vakurleika, rekreativt virði, og tí at onki samsvarandi øki er í nærumhvørvinum. Frástøðan frá nýggja havnarlagnum til rekreativa økið kring Kvørnina er umleið 200 m.

Umhvørvisstovan hevur kravt, at árinið á økið kring Kvørnina av øktum virksemi við nýggja havnarlagnum Undir Gøtueiði skal kannast nærri. Í notati, dagfest 16. mai 2024, hevur Biofar saman við Verkfo kannað alduávirkanina av skipaferðslu til og frá nýggja havnarlagnum á økið við Kvørnina. Siglingarmynstrið, tá skip leggja at við havnarlagið Undir Gøtueiði, er víst á mynd 3.




**Mynd 3** Siglingarmynstur, tá skip leggja at kai Undir Gøtueiði

Knud E. Hansen A/S hevur somuleiðis gjørt eitt notat, dagfest 3. mai 2024, har mett verður um, hvussu aldur frá skipum kunnu ávirka økið kring Kvørnina. Niðurstøðan í báðum notatunum vísa, at um mest loyvda ferð er 4-5 míl fyri skip, sum sigla til og frá havnarlagnum Undir Gøtueiði, so verður alduávirkanin av øktu ferðsluni fram við Kvørnina ógvuliga avmarkað, og munandi minni enn aldur, sum náttúruliga stava frá vindi og veðri annars.

Í árinsmetingini verður hægst loyvda ferð hjá skipum, sum leggja at við havnarlagið Undir Gøtueiði, ásett til 4 míl.

### 3.3 Djóralív í nærumhvørvinum

Kommunan hevur sett seg í samband við Tjóðsavnið við fyrispurningi um súgdjór í sjónum, fisk og fuglalív í økinum, har ætlanin er at byggja nýtt havnarlag Undir Gøtueiði. Tjóðsavnið hevur ongar upplýsingar um serstakt djóralív í økinum og metir, at tað er einki, ið bendir á, at økið hevur serligan týdning fyri súgdjór.

Karl A. Thomsen hevur gjørt eina kanning av økinum frá Tjørnunesi og uml. 1,5 km inn móti botninum á Skálafirði, fyri at kanna um farvegur er eftir æðu- ella másareiðrum, men hann fann ongin tekin um fuglalív. Kanningin bleiv gjørd 8. desember 2021.

## 3.4 Fornminni

Beint norðanfyri havnarverkætlanina Undir Gøtueiði (1. byggistig) er fornminnið nevnt Írakøstur (sí mynd 4). Ætlaða byggingin av havnarlagnum kemur ikki nærri enn 10 m frá fornminnunum.

Søvn Landsins hava onga viðmerking til ætlanina, ella krøv til, hvat skal gerast við lendið kring Írakøst.




**Mynd 4.** Staðseting av Írakøsti í mun til havnaverkætlanina Undir Gøtueiði

## 3.5 Plastdálking

Um plastleivdir eru í grótinum, sum verður nýtt til útfyllingina, sum t.d. frá Nonel leidningum, verður flótisperra løgd út, fyri at forða fyri dálking. Nærri ásetingar um hetta eru í umhvørvisgóðkenningini.

## 4. Avgerð

Við støði í umhvørvisárinsmetingini og øðrum samskifti við 24.04.2023 P/F metir Umhvørvisstovan ikki, at sjáldsom náttúra á sjónum, á botni ella uppi á landi fer fyri skeytið, ella at virksemið fer at hava skaðilig árin á fjørðin.

Umhvørvisstovan góðkennir tí ætlanina hjá 24.04.2023 P/F at gera og reka nýtt havnarlag Undir Gøtueiði við hesum treytum.

### 4.1 Treytir

4.1.1 Góðkenningin er treytað av, at verkætlanin verður framd, sum greitt er frá í umhvørvisárinsmetingini og øðrum samskifti millum Umhvørvisstovuna og 24.04.2023 P/F.

4.1.2 Umframt hesa góðkenning skal virksemið hjá 24.04.2023 P/F í sambandi við útbygging av havnarlagi Undir Gøtueiði hava umhvørvisgóðkenning sambært kap. 5 í løgtingslóg um umhvørvisvernd.

Í umhvørvisgóðkenningini verða settar treytir til virksemið, eitt nú um mannagongdir fyri forðing, so leidningsleivdir ikki reka burtur, um innsavning og skráseting av leidningsleivdum, burturkast, óljóð o.a.

4.1.3 Henda góðkenning tekur ikki støðu til aðrar møguligar góðkenningar ella loyvi sambært aðrari lóggávu.

## 5. Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 24 í løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg, kærast til landsstýriskvinnuna í umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðani sendir hana til Umhvørvismálaráðið við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er fýra vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Møgulig kæra skal vera Umhvørvisstovuni í hendi í seinasta lagi 30. august 2024 .

Sigga Jacobsen, deildarleiðari

/

Rúna Hjelm, umhvørvisviðgeri